**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Kanningar av makreleggum - Túrur nr. 1018**
**Tíðarskeið 20/05 - 1/06-2010**

**Fólk frá Havstovuni:** Høgni Debes, Jens Arne Thomassen og Anni Djurhuus

**Ábyrgd:** Høgni Debes

**Endamál:** Endamálið við túrinum var at kanna nøgdina av makreleggum í økinum kring Føroyar frá 60°N til 63°N, og 0°V til 9°V (sí Mynd 1 niðanfyri), og kanna eggini í gonadunum hjá búnum makrel-honum.

**Reiðskapur:** Seabird-CTD við rosettu, Bongo við 280µ meskavídd-glúpum, svartkjaftatrol við boyum.

**Um túrin:** Túrurin gekk stak væl. Makrelegg vórðu funnin í øllum økinum, tó mest í sunnara parti.
Vit fóru av Havnini kl. 18 tann 20. mai og sigldu suður á 3'75°V og 60'15°N, har vit tóku fyrstu støðina kl 0630. Vit arbeiddu okkum síðan vestureftir, og leygarmorgunin 22. mai varð roynt at trola eftir makreli, men til fánýtis; bert 6 makrelar vóru í trolinum umframt ein silvurkalvi og nakað av prikkafiski. Seint leygarkvøldið vóru vit vesturi á 14°V og vendu tá norður á 60'45°N hóast makrelegg framvegis vóru at síggja í prøvunum, hetta fyri at náa runt alt økið innan ásettu tíð. Sunnumorgunin var aftur roynt at trola eftir makreli, men enn einaferð til fánýtis; bert nakrir silvurkalvar og nakað av prikkafiski var í posanum. Síðan var hildið fram eystur til 2'15°V, har vit vóru á midnátt 24-25. mai. Higartil høvdu vit sæð makrelegg á flest øllum støðum. Veðrið hevði verið gott síðan vit fóru, men nú var vindurin vaksin nakað, høgætt upp í 8-13 m/s, og eitt sindur sjaskut var í sjónum.
Vit vendu nú norður á 61'15°N og hildu leiðina eystur á 0'15°V, áðrenn vit aftur vendu norður á 62'45°N fyri síðan at sigla vestureftir aftur. Nú vóru heldur færri egg at síggja, og á summum støðum vóru eingi egg funnin. Tá vit komu vestur á 4'15°V, var gjørt av at royna at trola heilt ovarlaga í sjónum, frá vatnskorpuni og niður á uml. 40 metrar, við boyum á svartkjaftatrolinum. Tóvað varð í 2 tímar og úrslitið var 1 tons av makreli og gott 500 kg av sild. Her fingu vit nokk av búnum makrel-honum til allar kanningarnar, ið skuldu gerast, umframt at vit eisini tóku ymiskar royndir av sildini.
Vit hildu síðan leiðina vestur um Føroyar, vestur á 12°15'V, har vit vóru á kvøldið 27 mai. Her vóru eisini færri egg at síggja, og eins og eystanfyri vóru støðir, har eingi egg vórðu funnin. Vit vendu nú norður á 62'45°N fyri síðan at sigla eystureftir aftur, og á kvøldi 29. mai vóru vit eysturi á 0°15'V. Her norðuri vóru væl færri egg at síggja, og á meir enn helvtini av støðunum vóru als eingi egg funnin. Vit sigldu síðan suður á 62°15'N og hildu leiðina vestureftir. Sunnumorgunin 30. mai vóru vit komin vestur á 3°45V og gjørt varð av at royna at trola frá vatnskorpuni og niður á 40 metrar. Vit fingu uml. 4 tons av makreli og sild (uml. 75% makrelur) og ein laks. Síðan var siglt suður á 61°15'N og 3°45'V og siglt vestur eftir. Her vóru fáar støðir, har makrelegg vórðu funnin. Um kvøldið 31. mai vóru vit komin vestur á 10°15'V, og hildu tá leiðina norður á 62°15'N, og tóku síðstu fimm støðirnar á veg eystureftir, áðrenn kósin var sett ímóti Tórshavn. Vit vóru á Havnini seinnapartin 1. juni.

**Prøvataking:** Vit tóku 118 støðir við Seabird CTDini, og 118 prøvar við Bongo, umframt 3 hál við svartkjaftatrolinum.

**Nær eru prøvarnir arbeiddir upp:** Makrelegg-prøvarnir verða arbeiddir upp í juni. Prøvarnir, sum skulu av landinum, verða sendir avstað skjótast til ber. Nytrur verða lisnar skjótast til ber, umframt at magar á bæði makreli og sild eisini vera arbeiddir upp skjótast gjørligt.

**Viðmerkingar:** Makrelur var at fáa í øllum økinum. Annar meistari Rúni Poulsen og aðrir royndu javnan eftir makreli við tráðu, ímeðan bongo var tikið. Hetta hepnaðist væl hjá teimum, javnan vóru um 10-20 makrelar fingnir uppá hálvan tíma og við hvørt vóru fleiri á í senn; bert hendinga ferð var einki at fáa.
CTD'in riggaði væl, men á middegi 27. mai varð roynt at taka hátalara-kápulin úr ctd-telduni, við tí úrsliti at teldan steðgaði. Við at sløkkja telduna og síðan tendra hana aftur sá tíbetur alt út til at rigga normalt og gott aftur. Sambandið við brúnna var ósvikaliga gott.




Mynd 1. Økið, sum ymisku londini skuldu kanna í periodu 4 (mai mánaði) í 2010. Ljósareyða økið kring Føroyar er økið, sum Magnus Heinason skuldi kanna.




Mynd 2. Siglingarleið og støðir á túri 1018. Prikkarnir eru støðir tiknar á túrinum. Litirnir merkja: blátt= makrelegg í stigi 1 eru funnin; ljósablátt= makrelegg í stigi 2-5 eru funnin, men eingi stig 1; reytt= eingimakrel egg funnin; grønt= ikki kannað enn.





4 tons-hálið á Fugloyarbanka-leiðini.




Annar meistarin Rúni Poulsen var trúgvur við tráðuni, tá bongo bleiv tikið; onkuntíð vóru fleiri á ísenn.




Nýggja útgerðin til at skilja fiskaegg frá djóraæti riggaði stak væl. Smáar luftbløðrur verða sprændar niður í traktina, sum prøvin er í – bløðrurnar hanga fastar í djóraætinum, sum so flotnar upp, ímeðan fiskaeggini søkka til botns, og verða tappað av til nærri kanningar.

 

Eitt dýpdarmátari til lemmarnar varð festur á bongo'ina, fyri at vita nær útgerðin var komin niður á 200m dýpi. Hetta riggaði sera væl.

 

Ein av uppgávunum var at finna 20 búnar makrel-honir (búningarstig >4). Hetta vísti seg at vera sera lætt, tá vit tóvaðu í vatnskorpuni.